# Tólv milliónir til eina fótbóltshøll

**FSF nevndin hevur gjørt av, at allir UEFA HatTrick pengarnir skulu nýtast at byggja eina fótbóltshøll fyri. Høllin skal kunna nýtast at spæla altjóða dystir í. Eisini er møguleiki at søkja um stuðul til smáar graslíkisvallir**

FÓTBÓLTSHØLL
*Jákup Mørk*

Tólv milliónir krónur liggja og bíða eftir at verða brúktar at byggja eina fótbóltshøll í Føroyum fyri. Høllin skal vera í fullari stødd. Vøllurin skal vera av tí, sum í UEFA og FSF máli verður kallað triðja ættarliðið av graslíki, og FSF hevur eitt brennandi ynskium, at tað skal bera til at spæla altjóða dystir í høllini.

Hesa ætlanina hevur FSF nevndin samtykt. Tað varð sagt í formansfrágreiðingini, sum Dánial Andreasen, FSF formaður, bar fram á aðalfundinum leygardagin.

Hesar tólv milliónirnar eru pengar, sum UEFA hevur sett av til FSF at brúka í sambandi við tað, sum í UEFA máli verður kallað UEFA HatTrick verkætlanir.

Í Íslandi eru fleiri fótbóltshallir í fullari stødd, og tað eru fleiri í hinum grannalondunum. Eitt nú spældu Føroyar landsdyst fyri fýra árum síðani ímóti Svøríki í sovornari høll í Växjö (úrslitið var 0–0).



*Í framtíðini verður tað helst møguligt hjá føroyskum feløgum at leika sínar altjoða dystir innandura*
*Savnsmynd*

Nevndin í FSF hevur gjørt av, at tólv milliónir frá UEFA skulu brúkast til eina og somu høllina av sovornum slagi. Tað er ikki greitt, hvar høllin skal byggjast. FSF heitir í ársfrágreiðingini á limafeløgini um at lata umsóknir inn frammanundan 1. juli í 2004. FSF biður um, at umsóknir um stuðul skulu innihalda fleiri ávísar upplýsingar.

Verkætlanin skal vera undirbygd ítróttarliga og fíggjarliga. Skitsuprojekt skal leggjast við. Vísast skal á grundøki – vídd, ábygging, bilstøðlapláss og ognarviðurskifti.

Setast skal upp hvussu fíggingin væntast at verða skrúvað saman. Her verður eitt nú hugsað um møguligar stuðulsjáttanir, sponsorar og møguliga lántøku. Saman við umsókníni skal eisini leggjast tíðarætlan frá 1. juli 2004 og mánað fyri mánað inntil ætlanin væntast at verða vorðin veruleiki.

Upplýsast skal eisini um ánaraviðurskiftini. Sum dømi verður nevnt ein ávísur eigari ella kanska ein Sjálvsognarstovnur saman við FSF.

Eisini biður FSF um, at gjaldførisætlan fyri hvønn mánað tvey tey fyrstu árini, sum høllin verður í nýtslu, verður sett upp. Og so skal fíggjarætlan fyri fýra tey fyrstu árini, sum høllin verður í nýtslu, eisini leggjast við.

### 4,8 milliónir til smáar vallir

UEFA hevur eisini gjørt av at veita peningaligan stuðul til bygging av smáum vallum. Tað vil siga vallum, sum ikki eru so stórir sum vallirnir, ið verða nýttir til kappingar.

FSF hevur sambært ársfrágreiðingini gjørt av at fylgja forskriftunum hjá UEFA. Talan er um vallir, sum í vídd eru umleið 21 ferðir 13 metrar. Kanska kann talan vera um norska slagið, sum er eitt sindur størri, og sum hevur frá einum og til hálvan annan metra høgan banda.

FSF arbeiðir við at gera nærri ásetingar og reglur hesum viðvíkjandi. Hesar verða sendar feløgunum, og tað verður møguleiki hjá feløgum og kommunum at søkja um at vera við í verkætlanini.

## Norrmaður royndarvenur við KÍ

Í løtuni er ein norskur áloypari og royndarvenur við KÍ stendur at lesa á heimasíðuni hjá Norðlýsinum. Talan er um 26 ára gamla Stig Edvin Aksnes, sum seinasta kappingarár skeyt ikki færri enn 21 mál fyri felag sítt Norheimsund í 2.deild í Noreg.

Við Norðlýsið sigur Aksnes, at hann er sera spentur upp á royndarvenjingarnar, sum komu í lag, eftir at KÍ hevði vent sær til ein norskan agent, við teirri vón at tað skuldi eydnast at finna teimum ein málslúkara á norska marknaðinum.

**tn**

## Todi í Suðurafrika

Tað gongur framá hjá Toda Jónsson. Á heimasíðu hjá Toda www.todi.fo stóð at lesa mánakvøldið, at Todi og liðfelagar hansara eru komnir fram til Suðurafrika á venjingarlegu.

Todi letur væl at bæði umstøðum og veðrinum í Suðurafrika, og somuleiðis eru góð tíðindi at frætta viðvíkjandi skaðatrupulleikunum hjá honum. Síðstu dagarnar hevur tað verið dagamunur, skrivar Todi, og hann roknar við, at tað ikki ganga nógvir dagar, áðrenn hann fær vant aftur á jøvnum føti við liðfeløgunum.

**tn**

# Dryppar á allar deildirnar

**Níggju feløg í bestu deildini fáa 70 prosent av 1,28 milliónum, meðan 2. deild fær ein fjórðing og lægri deildir eisini fáa eitt lítið sindur**

UEFA PENGAR
*Jákup Mørk*

Øll feløg, sum eru umboðað í føroysku fótbóltskappingunum hava nú møguleika at fáa pengar burturúr Europa Cup kappingini fyri meistaralið. Sambært munnligu framløguni hjá Dániali Andreasen á FSF aðalfundinum leygardagin, so hevur FSF nevndin samtykt, at upphæddin, sum FSF frá UEFA fær lutað burtur av yvirskotinum av europeisku meistarakappingini skal lutast soleiðis:

70 prosent skulu lutast millum feløgini í 1. deild – burtursæð frá felagnum, sum umboðar Føroyar í kappingini. 25 prosent skulu fara til feløgini, sum hava sítt besta lið í næstbestu deildini, og fimm prosent skulu fara til feløgini, sum hava sítt besta lið í 3. deild ella í lægri deildum enn so.

Talan er um ikki so lítlar upphæddir. Í fjør var talan um fyri føroyskan fótbólt tilsaman 272.700 sveisiskar frankar ella 1.280.000 krónur. Skipanin hevur verið galdandi í fýra ár, men á heysti í 2002 broytti UEFA ásetingarnar soleiðis, at tað nú bara er meistaraliðið, sum ikki kann fáa burturav pengunum.

UEFA hevur ásett treytir til feløgini, sum tey skulu lúka fyri at fáa lut í hesum pengunum. Ein er, at felagið ikki skal taka lut í europeisku meistarakappingini hetta árið, og ein onnur er, at feløgini fyri at fáa lut í pengunum skulu hava egna ungdómsvenjaraætlan fyri allar aldursbólkar frá 12 ára aldri og uppeftir.

Sambært UEFA er tað upp til FSF at gera av, um gjaldast skal til øll feløg ella bert til feløg við liði í 1. deild. Um øll feløg skulu hava eins stóran part ella um útlutast skal eftir ávísum dygdarlykli er eisini upp til FSF at avgera. Tað er eisini upp til FSF at gera av, um reglur skulu gerast fyri at tryggja, at peningurin verður brúktur, sum tað er ætlað.

### Treytirnar

Sum omanfyri nevnt, so hevur FSF nevndin gjørt av, at níggju 1. deildarfeløg skulu eiga 70 prosent, 2. deildarfeløgini 25 prosent og onnur feløg fimm prosent.

Í sambandi við samtyktina um, hvussu pengarnir skulu býtast, hevur FSF nevndin ásett treytir, sum feløgini skulu ganga undir, um tey yvirhøvur skulu vera við í býtinum. Ein er, at felagið hevur eina skrivaða og útgreinaða ungdómsmenningarætlan. Ein onnur er, at felagið hetta ávísa kappingarárið luttekur við liðum í minst trimum av hesum deildunum: piltar, gentur 10–12 ár, smádreingir, smágentur, dreingir, gentur og unglingar. Tað ber eisini til at uppfylla hetta kravið við at hava skrivaða avtalu við annað felag um samstarv um ávísa deild.

Triðja kravið, sum FSF setur, er, at útreiðslurnar til ungdómsdeildina í felagnum verða útgreinaðar og settar fyri seg í roknskapinum og vístar sum nota í roknskapinum saman við inntøkuni frá europeisku meistarakappingini.

FSF setur eisini sum treyt, at Fótbóltssambandið, um tað hevur áhuga fyri tí, skal fáa innlit í ella avrit av øllum útreiðsluskjølum, sum eru hildnar sambært triðju treytini. Síðsta treytin er, at útreiðslurnar til ungdómsdeildina hjá felagnum hækka samsvarandi upphæddini, sum fæst í UEFA pengum, og at hesar ongantíð eru minni enn tað dupulta at UEFA meistarapengunum.

Burtusæð frá HB, sum er meistari, og sum fær meiri enn eina millión krónur fyri at taka lut í Europa Cup fyri meistarar, fáa hini níggju feløgini í 1. deild eins nógv burturúr nevndu pengunum. Upphæddin verður 99.555 krónur. Harafturat fáa feløgini, sum taka lut í UEFA Cup og Intertoto Cup, eisini pengar.



# Ian á besta liðnum

**Christian Høgni Jacobsen hevur nú fingið ein annan fyrrverandi NSÍ spælara sum liðfelaga í Vejle**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Eftir at talið á føroyskum fótbóltsspælarum uttanfyri landoddarnar hevur verið minkandi tvey tey seinastu árini, tykist tað sum um, at talið aftur er farið at økjast og tað av álvara.

Eitt dømi um nýggjan fótbólts útiseta er Ian Højgaard. Síðsta heyst flutti Ian Højgaard, sum hevði verið fastur fúsur á NSÍ miðvøllinum, aftur til Vejle, har hann hevði búð fleiri ár frammanundan og eisini roynt seg sum Vejle spælara.



*Runavíkingurin Ian Højgaard tykist nú vera annar føroyingurin á besta liðnum hjá Vejle*

Nú er Ian aftur farin at venja við Vejle, og um fyrstu venjingardystirnir verða nýttir sum grundarlag, so eru ábendingar um, at tað kann fara at eydnast hjá honum at vera við í kappingini um plássini á besta liðnum, sum spælir í næstbestu deildini.

Leygardagin spældi Vejle venjingardyst á heimavølli ímóti Skive. Ian var á Vejle miðvøllinum allar 90 minuttirnar. Úrslitið var 2–2, eftir at tað í steðginum hevði staðið á jøvnum 1–1.

Umframt Ian Højgaard so var ein annar føroyingur á Vejle liðnum. Talan var sjálvandi um Christian Høgna Jacobsen, sum í fjør vann sær fast pláss í Vejle álopinum. Christian Høgni var frá fyrsta bríksli í álopinum ímóti Skive. Fram ímóti dystarenda varð hann útskiftur. Tá hevði hann frammanundan lagt Vejle framum 2–1.

Nú er Christian Høgni við landsliðnum á venjingarlegu í Spania. Ian Højgaard er í Vejle, og næstu dagarnar fara hann og liðfelagarnir at spæla fleiri venjingardystir.

# Feløgini skulu søkja um loyvi at spæla

**Nú verður farið undir at seta minstukrøvini hjá UEFA í verk, og tað ber við sær, at øll feløgini skulu á vektina hjá loyvisnevndini**

MINSTUKRØVINI
*Jákup Mørk*

Teir næstu dagarnar er tað týdningarmikið, at fótbóltsfeløgini, sum eru umboðað í bestu deildini, nýta tíð uppá minstukrøvini. Hetta er eitt lutfalsliga nýtt hugtak í føroyskum fótbólti. Men tað er týdningarmikið, at feløgini taka hetta í álvara.

Feløgini fingu á aðalfundinum leygardagin eina loyvishondbók. Í henni eru minstukrøvini ásett, sum UEFA hevur sett øllum feløgunum, sum ætla sær at luttaka í skipaðum fótbóltskappingum. FSF hevur syrgt fyri, at bókin og harvið krøvini eru umsett til føroyskt.

Minstukrøvini hjá UEFA verða sett í gildi í øllum limalondunum samstundis. Tað eru kortini ikki heilt tey somu krøvini í øllum limalondunum. Krøvini eru lagað eitt sindur eftir umstøðunum. Eitt nú verða krøvini til trygd í Føroyum ikki heilt tey somu, sum tey eru so mangar aðra staðni.

Í FSF er tað varaaðalskrivarin, Fríði B. Nielsen, sum fer at taka sær av hesum málsøkinum. Sambært skriv frá FSF og til feløgini er mannagongdin tann, at fótbóltsfeløgini skulu søkja um loyvi at taka lut í føroysku landskappingini. Fyri at fáa játtandi svar upp á umsóknina mugu feløgini lúka minstu krøvini hjá UEFA. Hetta er tað, sum eisini verður nevnt UEFA loyvisskipanin. Fyri 2004 eru tað bara feløg, sum spæla í 1. deild, sum tað verður kravt av, at tey skulu lúka minstukrøvini og tískil skulu senda umsókn inn um loyvi at taka lut í kappingini.

Umsóknarbløðini skulu vera FSF í hendi aftur í seinasta lagið týsdagin 9. mars. FSF bjóðar sær til at vegleiða feløgunum, tá ið tey fyri fyrstu ferð skulu útfylla bløðini.

Í FSF fer ein loyisnevnd at verða sett. Tað verður henda nevndin, sum fer at kanna umsóknirnar hjá einstøku feløgunum og at gera av, um feløgini eru skipað og umsitin soleiðis, sum tað verður lagt upp til og kravt í loyvis hondbókini.

Í fyrstu atløgu verður ikki roknað við, at minstu krøvini fara at kosta føroysku feløgunum nógvar pengar. Krøvini hava við fyrisiting og fíggjarligt gjøgnumskygni at gera. Hetta eru krøv, sum flestu feløgini í fremstu røð longu hava fyrireikað seg til.

Tey krøvini, sum fara at kosta pengar, hava við umstøðurnar hjá áskoðarunum at gera. Tað verður mett sannlíkt, at feløgini fara at fáa møguleika at spæla altjóða heimadystir – tað vil siga í Europa Cup kappingum – tá ið graslíkisvallirnir av triðja ættarliðnum, sum teir verða nevndir, eru góðkendir. Tá fer UEFA at krevja, at tað kring vallirnar fara at vera 300 sitipláss, og at helmingurin av teimum skulu vera undir taki.

# Tryggingarfelagið Føroyar høvuðsstuðul hjá EB-Streymi

**EB-Streymur og Tryggingarfelagið Føroyar hava gjørt eina avtalu, sum inniber at Tryggingarfelagið Føroyar er høvuðsstuðul hjá EB-Streymi**

SPONSORAVTALA
*tíðindaskriv*

EB-Streymur kláraði seg væl seinasta kappingarár. EB-Streymur endaði á 6 plássið, men sera lítil munur var millum nummar 6 og 4 í kappingini.



*Stuðulsavtala er nú gjørd millum EB-Streym og Tryggingarfelagið Føroyar*

Einki gerst uttan gott fíggjarligt grundarlag, og ein týðandi partur av hesum grundarlagi er at hava ein góðan høvuðsstuðul.

Sáttmálin fevnir um eina grundupphædd, og harumframt verður veitt eitt bonus, alt eftir, hvussu frammarlaga EB-Streymur verður í kappingini.

## Bridgelandsliðið sett

TÍÐINDASKRIV

Føroya Bridge Samband hevur, eftir áheitan frá landsliðsvenjaranum, Svend Novrup, mannað landsliðið, ið skal umboða Føroyar í opnum rað til EM, sum verður í Malmø í summar. Teir seks leikararnir, ið skulu umboða Føroyar eru:

Jóannes Mouritsen – Heðin Mouritsen
Bogi Simonsen – Símin Lassaberg
Arne Mikkelsen – Pól Egholm
Rói á Rógvu Joensen, liðskipari

Kvinnulandsliðið eru somuleiðis sett, og tær seks kvinnurnar, ið skulu umboða Føroyar, eru:

Arnleyg Mikkelsen – Marjun Restorff
Laila Danielsen – Maria Christiansen
Jóna Gruntveit – Henriette Svenstrup
Marner Joensen er liðskipari

Bridgesambandið hevur eisini ætlanir um at senda eitt landslið av seniorum til Malmø. Teir, ið hava áhuga í at royna seg, skulu seta seg í samband við Mortan Rasmussen.

Sum ein liður í fyrireikingunum til Malmø, var bruttohópurin hjá liðnum í opna rað í Danmark herfyri, har nakrar venjingardystir vóru leiktir móti tveimum donskum liðum. Ikki gekk eins væl og væntandi var. Føroyingarnir taptu fimm dystir, vunnu tveir og leiktu ein javnan.